# Jólasølan á Stíggi hevur stóra undirtøku

**- Tá ið jólasølan endaði seinasta ár, var bert uppí eina lítla pappeskju eftir av lutum, sum brúkarar høvdu gjørt, siga tey á Verkhúsinum Stíggi**

JÓLASØLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í fleiri ár hevur Verkhúsið Stíggjur í Saltangará skipað fyri jólasølu, har ymiskir jólalutir, sum brúkararnir á stovninum gera, verða seldir.

Aftur í ár verður jólasøla, og hesaferð hava tey valt leygardagin komandi. Opið verður millum klokkan 10 og 14, og meðan sølan fer fram, verða brúkarar og starvsfólk at hitta á stovninum. Eisini verður vørutombola og kaffisøla.

Umframt ymiskt jólapynt - nissur, jólakalendarar, einglar, dúkar, pútur, reinsdjór og annað, sum teir umleið 20 brúkararnir hava gjørt - verða myndir eisini seldar.

Á Stíggi hanga hesar myndir uppi og kunnu tí lættliga skoðast.



*Jólasøla verður á Verkhúsinum Stíggi í Saltangará leygardagin. Opið verður millum klokkan 10 og 14. Eisini verður vørutombola og kaffisøla*

### Stór undirtøka

Á Verkhúsinum siga tey, at jólasølan undanfarin ár hevur fingið sera góða móttøku - og tað legst til á hvørjum ári.

- Familja, vinir og kenningar til brúkararnar eru ófør at vitja, tá ið jólasøla er, men mong onnur nýta eisini høvi at støkka inn á gólvið og keypa sær eitthvørt, sum hoyrir jólunum til.

Spurd, hvussu gekst seinasta ár, siga tey, at tá ið dagurin var av, var bert uppí eina lítla pappeskju eftir av lutum.

- So, vit kunnu ikki siga annað enn, at undirtøkan hevur verið ógvuliga góð, og at vónirnar um søluna leygardagin tískil eru bjartar.

Lutirnir, sum verða seldir á jólasøluni, eru flestu gjørdir eftir summarfrítíðina. Hinvegin eru myndirnar teknaðar og málaðar gjøgnum alt árið.

### Jólahugni

Í desember hugna tey sær á Stíggi.

Jólahugni verður fyri brúkarum, foreldrum og avvarðandi, og áðrenn farið verður í jólafrí, verður jólaborðhald við góðum døgurða fyri brúkarum og arbeiðsfólkum á stovninum.

- Jú, her er hugnaligt í desember mánaða, siga tey á Verkhúsinum Stíggi í Saltangará.

# Virka og ala kongakrabba í Vardø í Noregi

**Við eini árligari kvotu, sum er 50.000 kongakrabbar og ætlanum um aling av hesum krabbaslagnum, eru teir farnir undir eina áhugaverda verkætlan í Vardø í Noregi.**
**Í fjør lógu prísirnir beint niðanfyri 200 norskar krónur fyri kilo av virkaðum kongakrabba**

KRABBAVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í summar fóru føroyingar, sum hava royndir í krabbavinnu í Grønlandi, undir at veiða og virka krabba uppi á landi. Skipið, Bergunn, sum er fyrrverandi Skansatangi, varð keypt til endamálið, og fyrrverandi Sam-Fisk í Ákleiri varð leigað til virking av krabbanum.

Umborð á Bergunn vóru einir 8-9 mans, harav fleiri hava verið í krabbavinnu áður, og á virkinum var talið av fólki nakað tað sama. Leiðslan á virkinum hevði eisini drúgvar royndir umborð á krabbabátum í Grønlandi.

Væl av krabba var at fáa, men trupult var at fáa lønsemi í vinnuna á landi. Hóast skipið var úti einar 3, 4 ella 5 dagar hvønn túrin, var krabbin framvegis livandi, tá ið teir komu til lands: Men trupulleikin var, at krabbin misti so nógv bein undir framleiðsluni. Tá ið bein detta av, fellir prísurin, og tá er skjótt, at ov lítið fæst fyri vøruna til tess, at vinnan kann vera lønandi.

Í løtuni er eingin krabbaveiða undir Føroyum og tískil heldur eingin framleiðsla uppi á landi. Teir, sum eiga Bergunn, hava ligið fram við at leigað ein bát, har teir kunnu virka krabban umborð heldur enn í landi.

### Verkætlan í Noregi

Í Vardø í Norðurnoregi er normaðurin, Hans Nordgaard og felag hansara, Contrace AS, farin undir at byggja eina áhugaverda verkætlan upp. Teir hava leigað seg inn í gomul høli til tess at byrja varliga og ikki gera ta stóru íløgurnar. Her er ætlanin, at kongakrabbin, sum veiddur verður í russiskum sjógvi, skal virkast. Talið av arbeiðsfólki verður á leið tað sama, sum teir, ið eiga Bergunn, høvdu í Ákleiri, eini 8-9 tilsamans.

Tað er russiska felagið, Visir Nord, sum Contrace AS eigur, ið hevur fingið tilutað krabbakvotuna uppá 50.000 stórar kongakrabbar. Henda kvotan er samstundis liður í eini granskingarætlan.

- Tað er trupult at siga, hvør umsetningurin verður, áðrenn vit vita, hvat marknaðurin vil gjalda fyri vøruna. Men vit ivast ikki í, at tað er eitt stórt potentiali í hesi vinnu. Í fjør lógu prísirnir beint niðanfyri 200 norskar krónur fyri kilo av virkaðum krabba. Hóast stórar avbjóðingar liggja í hesi verkætlan, vænti eg, vit verða løntir fyri stríðið, sigur Hans Nordgaard.

Hann vísir á, at krabbin, sum veiddur verður í russiskum sjógvi, verður førdur til lands. Hóast kvotan er russisk, er ætlanin, at meginparturin av veiðini verður landað og virkað í Vardø.

- Í fysta lagi verður ein partur av veiðini kannaður, sum liður í granskingini. Síðan verður krabbin virkaður til marknaðirnar í Japan, USA og Evropa, sigur Hans.

Krabbakvotan, sum Visir Nord hevur fingið, er latin fyri komandi 10 árini.

Í Finnmørkini siga fiskimenn, at kongakrabbin, sum er ein stórur krabbi, er til "pest og plágu" fyri aðrar veiðihættir í økinum.

### Eisini aling

Ætlaninar hjá Hans Nordgaard í Vardø snúgva seg um meira enn veiði og virking. Felagið, Contrace AS, fer eisini at ala krabba, samstundis sum tey fara at virka veiddan krabba.

- Vit hava loyvi at ala eina miljón yngul, men í byrjanini miðja vit eftir at ala 200.000 yngul, sigur hann.

Í mars verða hon-krabbar veiddir í Barentshavinum og førdir livandi til Vardø, har yngulið verður alt í stórum tangum.

- Vit eru greiðir yvir, at hetta er ein stór og avbjóðandi verkætlan, sum neyvan verður uttan trupulleikar. Hetta er eitt óroynt øki, bæði hvat víðvíkur tøkni og menning av føðuri.

Hans Nordgaard sigur at enda, at verkætlanin í Vardø kemur at fevna um fleiri ár.



*Kongakrabbin er til "pest og plágu" fyri aðrar veiðihættir í Finnmørkini, men úti í heimi er hetta eftirspurdur matur. Prísurin fyri virkaðu vøruna er næstan 200 krónur fyri kilo. Nú eru nordmenn farnir undir at veiða og virka henda krabban í Vardø - og til várs verður eisini farið undir at ala hann í stórum tangum*



# Horvni fulltrúin gav tilmæli

**Tað var helst eitt stórt offur hjá Jacob Vestergaard, landsstýrismanni, at siga fulltrúan í Fiskimálaráðnum úr starvi. Tí tað var júst fakligu dygdirnar hjá hesum manni hann dúvaði uppá, tá hann gav Arctic Viking eldfima loyvi at flagga út**

ÚTFLAGGING
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Fulltrúin, sum ikki kundi brúkast, var góður nokk kortini.

Tað vísa skjølini í málinum, har Fiskimálaráðið hevur givið Arctic Viking loyvi at flagga út til Litava í tvey ár. Sosialurin hevur fingið innlit í tilmælið, sum landsstýrismaðurin byggir sína avgerð á. Tilmælið er undirskrivað av fulltrúanum, sum seinni varð koyrdur úr starvi, tí umboðsmaðurin fanst at Fiskimálaráðnum fyri drál í sambandi við umbøn um alment innlit.

Sostatt er líkt til, at Jacob Vestergaard hevur koyrt ein mann úr starvi, hvørs fakliga førleika hann hevur fult álit á.

Stóri politiski og løgfrøðiligi knúturin í spurninginum um at loyva Arctic Viking at flagga út hevur verið, um tað var í samsvari við lógina um umlegging av lánum hjá fjarfiskiflotanum. Arctic Viking fekk játtað átta milliónir krónur rentu- og avdráttarfrítt lán sambært hesi lóg. Lánið verður niðurskrivað eftir tólv árum. Endamálið við lógini er at varðveita fjarfiskiflotan, serstakliga rækjuflotan. Og tí hevur verið róð framundir, at tað var brot á treytirnar fyri láninum, um skip flaggaðu út.

Men fulltrúin helt kortini ikki, at tað var brot á nakra løggávu, um loyvi varð givið Arctic Viking at flagga út fyribils.

»Í útgangsstøðinum hevur tað tí verið ætlanin, at rækjuskipini, sum fingu umlagt lán, veiddu av føroyskum rættindum, t.v.s undir føroyskum flaggi. Hinvegin er tó einki forboð ímóti, at skipið kann leiguskrásetast undir øðrum flaggi. Tað verður tí ikki mett, at tað er í stríð við løgtingslóg um umlegging av lánum hjá fjarfiskiflotanum, um so er, at m/tr Arctic Viking verður leiguskrásett í Litava í eitt ávíst tíðarskeið«, verður sagt í uppritinum.

Reiðaríið søkti upprunaliga um trý ár, men fulltrúin mælir til at geva loyvi í tvey ár. Hann sigur eisini, at niðurskrivingin av umrøðda láninum eigur at steðga, meðan skipið er undir fremmandum flaggi, tí soleiðis kann landskassans peningur tryggjast tey tólv árini ella rindast aftur.

Loyvi hjá Arctiv Viking at fiska undir litaviskum flaggi er latið í tvey ár við teirri treyt, at niðurskrivingin av skuldini lækkar.

Sostatt hevði landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum fult álit á, at fakliga rágevingin hjá fulltrúanum, sum misti starvið, tí ein svarfreist ikki varð hildin, var haldgóð.

# Ov stutt skotbrá at broyta barsilskipan

**Tað eru hvørki umstøður ella tíð at viðgera broytingar í barsilsskipanini í sambandi við eina fíggjarlógarviðgerð, halda partarnir á arbeiðsmarknaðinum. Teir halda, at landsstýrið eigur at halda sína skyldu og rinda sín part av Barsilsskipanini**

BARSILSKIPAN
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*



*BARSIL. Skal rætturin hjá pápum at vera heima hjá barninum skerjast. Tað er ein av fleiri broytingum, sum kunnu vera í væntu*

*Mynd: Jens K. Vang*

Feløgini á arbeiðsmarknaðinum taka ikki undir við, at barsilsskipanin verður broytt munandi í sambandi við eina fíggjarlógarviðgerð. Hvørki at tað almenna ætlar at gevast við partvíst at fíggja skipanina, ella at ávísir lønmóttakarabólkar vera við skerdan lut.

Tað gera tey púra greitt í einum skrivi til samgonguna og teir politisku flokkarnar, sum varð sent hósdagin. Brævið er undirskrivað av formonnunum í Føroya arbeiðsgevarafelag, Føroya arbeiðarafelag, S&K, Føroya reiðarafelag og Føroya Fiskimannafelag.

Sostatt verður torført at fáa undirtøku fyri teirra bjargingarætlan, sum samgongan arbeiðir við, nú barsilsskipanin hevur fingið andaneyð.

Skipanini vantar pening, og Bjarni Djurholm hevði skotið umfatandi broytingar upp. Eitt nú skuldi hámarkið fyri útgjaldi lækkast úr 35.000 krónum niður í 20.000 krónur, útgjaldið skuldi lækkast úr 100 niður 90 prosent av lønini, inngjaldið til skipanina skuldi hækkast, og rætturin hjá pápum at fara í farloyvi skuldi skerjast. Við broytingini varð munur gjørdur á privat og alment løntum, tí alment løntum er tryggjað fult endurgjald í sáttmálanum.

Tjóðveldisflokkurin vildi ikki ganga við til uppskotið, tí tað undirgrav Barsilsskipanina, varð sagt. Í staðin skjeyt flokkurin upp, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum rindaðu alla skipanina, sum ikki skuldi broytast størvegis. Men tað vilja partarnir á arbeiðsmarknaðinum ikki hoyra talan um.

### Einki samstarv

Feløgini vísa á, at stovnsetanin av Barsilsskipanini var ein partur av samgonguskjalinum frá 1998 til 2002. Har varð sagt, at virkast skuldi fyri einum barnsburðargrunni fyri allar partar av arbeiðsmarknaðinum. Barsilsskipanin avloysti tær almennu skipanirnar á økinum, sum vóru eftir dagpeningalógini og skipanina fyri fólk í almennum starvi.

Almennu skipanirnar kostaðu umleið 25 milliónir krónur árliga. Hesar játtanir vóru fluttar í Barsilsskipanina sum partvís fígging av skipanini.

– Hesa fígging ætlar landsstýrið nú at sleppa sær undan. Partarnir á arbeiðsmarknaðinum halda, at landsstýrið eigur at halda sína skyldu mótvegis Barsilsskipanini og rinda sín lutfalsliga part til skipanina, siga feløgini, sum sostatt ikki taka undir við, at skipanin verður broytt fyri at fáa fíggjarlógina at ganga upp.

Skulu broytingar fremjast í skipanini er neyðugt, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum fáa stundir til at viðgera skipanina í síni heild og framtíð hennara.

– Tað eru hvørki umstøður ella tíð at viðgera hetta í sambandi við eina fíggjarlógarviðgerð, halda feløgini.

### Kennir sjónarmið

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum, kennir sjónarmiðini, hóast hann ikki hevur sæð brævið, tí hann hevur verið á fundi við øll feløgini í vikuni. Hann hevur sent løgmanni, landsstýrismonnum, fíggjarnevnd og floksformonnum eitt status, har hann sigur tað vera ógjørligt at fáa arbeiðsmarknaðin við uppá at gjalda gildið.

– Eg havi gjørt støðuna upp og sigi frá, at vit fáa ikki broytt skipanina í samráð við partarnar á arbeiðsmarknaðnum. Eg haldi sjálvur tað vera skeivt at smoyggja eina skipan niður yvir høvdið á partarnar á arbeiðsmarknaðinum, sum teir ikki vilja kennast við, tí hetta er eitt ov stórt mál, ið kostar 75 milliónir krónur. Hinvegin havi eg fingið eina tilsøgn um, at vit kunnu tosa um tað seinni, sigur Bjarni Djurholm.

Hann hevur sent bóltin víðari til løgmann og landsstýrið. Sjálvur sigur hann, at hann hevur fingið álagt at spara 22,5 milliónir krónur til skipanina á fíggjarlógini, og tað var tað, hann royndi. Nú bíðar hann.